## Arnesen samdur við Chelsea

Frank Arnesen hevur seinastu árini verið talentstjóri í enska stórfelagnum Chelsea. Seinastu mánaðirnar hevur nógv verið skrivað um, at fyrrverandi danski landsliðsleikarin ikki heldur fram í starvinum. Men tað er eftir øllum at døma ikki satt. – Tað er eingin trupulleiki. Mítt starv verður eisini í Chelsea komandi árið, sigur Arnesen við onside.dk



## Melo heldur fram

Tað verður í øllum førum ikki á hesum sinni, at Felipe Melo skiftir til Arsenal. Fjølmiðlar hava skrivað dúgligt um eitt møguligt skifti, har brasiliumaðurin Gilberto, sum áður hevur spælt í Arsenal, hevur rátt landsmanninum til at flyta til Arsenal. Felipe Milo longdi í gjár sín sáttmála við Fiorentina, sum er galdandi til 2013.

# Ítróttarliga kunnu Føroyar hýsa oyggjaleikunum




Jørgen Petterson (á insettu myndini) sigur, at føroyingar fyrst og fremst mugu gera upp við seg sjálvar, um vit skulu satsa upp á at skapa neyðugu karmarnar til at hýsa Oyggjeleikunum

Mynd: Álvur Haraldsen

**Forsetin í IIGA, Jørgen Petterson heldur, at Føroyar hava ítróttarligu fasilitetirnar til at hýsa oyggjaleikunum. Men vit mugu gera upp við okkum sjálvar, um vit ynskja at økja talið av seingjarplássum í Føroyum**




Heri Simonsen

Forsetin í International Island Games Association, Jørgen Petterson úr Álandi hevur góðar royndir við Føroyum. Hann var við álendska flogbóltslandsliðnum í Føroyum, tá oyggjaleikirnir vóru her á landi í 1989. Spurdur um Føroyar kunnu hýsa oyggjaleikunum í 2017 ella í 2019 svarar Jørgen Peteterson:

- Eg trúgvi, at Føroyar hava møguleika at hýsa leikunum, tá tað kemur til tann ítróttarliga kapasetetin. Føroyar hava longu havt leikirnar, og fyri mín part vóru oyggjaleikirnir í 1989 ein stór upplivíng. Men at hýsa oyggjaleikunum, krevur eisini, at seingjakapaseturin í Føroyum verður munandi øktur.

– Tit mugu gera upp við tykkum sjálvar, hvussu nógvum fólkum tit kunnu hýsa. Nú hava vit 3.200 fólk á hesum leikunum, og tað má sigast at vera pínumarkið fyri hvussu nógv fólk kunnu koma á til oyggjaleikir. Eg trúgvi ikki, at ein kann fara upp um hetta talið. Og tað er har føroyingar mugu loysa trupuleikan, segði Jørgen Petterson í viðtalu við Rás2 sunnudagin.

### Væl nøgdur

Jørgen Petterson er annars væl nøgdur við fyrireikingina av oyggjaleikunum:

- Eg eri ógvuliga stoltur av øllum álendingum, sum hava gjørt sítt fyri, at oyggjaleikirnir skulu eydnast. Tá tosi eg ikki bara um tey sum sita í fyrireikingarnevndini fyri oyggjaleikirnar á Álandi, men eisini øll tey mongu sjálvbodnu kring Áland, sum hava meldað seg til at hjálpa til á leikunum. Tey hava veruliga stillað upp, og víst, at tað er dugur í teimum, undirstrikar Jørgen Petterson.

– Eg var ein rørdur maður tá oyggjaleikirnir vóru settir her í Mariehamn leygardagin. Tað føldist, sum um ein náddi einum hægri máli. Men tað ræður fyrst og fremst um, at ítróttarfólkini hava tað gott, tí tað er tey alt snýr seg um. Spurdur um allir álendingar hava eitt hjartað við í oyggjaleikunum, svarar Jørgen Petterson:

- Ein skal ongantíð siga øll, men eg havi varhugan av, at nærum allir álendingar fegnast um, at Áland hýsir oyggjaleikunum.

### Afturbering til ítróttin

Tað hevur kravt nógva tíð av Jørgeni Petterson at vera forseti í IIAG: - Hetta er eitt sjálvboðið starv, sum ein ger, tí ein heldur, at hetta er stuttligt og mennandi. Summar tíðir krevur hetta nógva tíð, og nógv arbeiðið. Nú er so sjóneykan sett á Isle of Wight, sum fer at hýsa oyggjaleikunum í 2011.

– Líkamikið hvør hýsir oyggjaleikunum, so er talan um eina serliga og sjarmerandi uppliving. Eg minnist í 1989, at vit búðu í skúlanum í Klaksvík, tað var einastandandi gott. Sjálvur spældi Jørgen Petterson við álendska flogbóltslandsliðnum fram til oyggjaleikirnar á Gibraltar í 1995. Jørgen er sera fegin um tey vinabond hann hevur knýtt á oyggjaleikunum, og tær stóru upplivingarnar hann hevur havt á oyggjaleikunum. Hann staðfestir, at uttan oyggjaleikirnar, so hevði álendski ítrótturin ongantíð ment seg. Tað er ringt hjá álendingum at vinna seg á finsk landslið í teimum ymisku ítróttargreinunum, og tí hava oyggjaleikirnir alt at siga fyri Áland.

– Mítt sjálvbodna arbeiðið fyri IIGA er ein afturbering og tøkk fyri allar tær góðu og stóru upplivingarnar eg havi fingið í oyggjaleikahøpi, staðfestir tann blíði og fyrikomandi, álendski IIGA-forsetin at enda.